## Gólv fyri hálva millión

Tað er ikki hissin karmar, sum hondbóltsfinalan verður spæld í. Vanliga er høllin á tremur við væl hýrdum áskoðarum, og í fjør varð talan eisini um altjóða hondbóltsgólv. Gólvið keypti Tórshavnar Kommuna fyri hálva millión, soleiðis at altjóða undankappingardystir kundu spælast í høllini, men bæði leygar- og sunnudagin verður undirlagið nýtt til steypafinalur hjá vaksnum og yngru deildum.



## Uttan Giggs í fýra vikur

Ryan Giggs bleiv skaddur tá hann rendi saman við Steve Sidwell í dystinum í fyrrakvøldið, tá Aston Villa og Manchester United spældu javnt á Villa Park. Tað er nú staðfest at Ryan Giggs ikki kann spæla fótbólt í fýra vikur. Hetta merkir at Sir Alex Ferguson má síggja burtur frá 36-ára gamla walisanum til Champions League dystirnar móti AC Milan. Hann verður heldur ikki tøkur til Carling Cup finaluna, sum verður 28. februar.



Liljan Djurhuus hevur verið stórskjúttin hjá VÍF í vetur. Nú standa hon og liðfelagarnir fyri størstu avbjóðingini á árinum

# Ein sigur at standa í finaluni

**Hóast tær avgjørt ikki ætla sær at geva upp, longu áðrenn dysturin er byrjaður, so ásanna tær í VÍF, at Stjørnan er favorittur**

Elsti spælarin hjá VÍF er bara 24 ára



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

gomul. Liðið er akkurát flutt upp í Sunset-deildina eftir at eitt mest sum fullkomið ættarliðsskifti er farið fram, og eingin av spælarunum á liðnum hevur áður staðið í eini steypafinalu.

Tað hevur fingið tey flestu til at avskriva spenningin í kvinnufinaluni, men stórskjúttin hjá VÍF, Liljan Djurhuus, vil á ongan hátt avskriva seg og sínar.

– Sjálvandi er Stjørnan favorittur, og tað er væl tey fæstu, sum vænta nakað av okkum til dystin. Men talan er altso um eina finalu, og sjálvandi trúgva vit uppá, at vit kunnu skapa sensatiónina. Annars kanst tú bara gevast beinanvegin, sigur Liljan Djurhuus.

Hóast hon og liðfelagarnir nú fyri fyrstu ferð rigga seg til at spæla steypafinalu, so er hetta ikki nakað, sum hevur rúgva alt ov nógv hesa farnu vikuna.

– Vit hava roynt at vant á sama hátt, sum vit hava gjørt hinar vikurnar. Sjálvandi hava vit tosað nakað um finaluna, sum vit allar gleða okkum til, men vit hava ikki gjørt nakað serligt burturúr.

Eru so nakrar serligar taktiskar snillur, sum tit hava vant nú til finaluna?

– Nei, tað haldi eg ikki. Sjálvani er venjingin rættað móti dystinum, men vit hava ikki uppfunnið nakað nýtt nú í evstu løtu. Hjá okkum er mest umráðandi, at vit klára at gera tað, sum vit eru bestar til. Sum árið hevur gingið, hava vit verið betri til at avmarka tær ringu løturnar í dystinum, og hesa ferð skulu vit vera á tærnum í 60 minuttir. Megna vit tað, og hava vit dagin, so kunnu vit gera tað. Og samstundis skulu vit so fegnast um, at tað hjá okkum er ein sigur í sjálvum sær at vera í finaluni, sigur Liljan Djurhuus.

# Vit eiga at vinna

**Megnar Stjørnan at spæla sítt spæl, so eigur talan ikki at gerast um alt ov stóran spenning. Men tað setir eisini síni krøv at vera favorittur, heldur Una Olsen hjá Stjørnuni**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Hon hevur lyft Coca Cola-steypið hjá kvinnum oftari enn nakar annar spælari. Fimm ferðir hevur Una Olsen saman við liðfeløgunum í Stjørnuni verið við til at vinna steypakappingina, og hóast Stjørnan í flestum førum hevur verið favorittur, so hevur talan undan finaluni mest sum verið um eitt mantra. At ein finala er ein finala, og alt er opið.

Verður hugt eftir stigatalvuni í ár, so er alt tó ikki eins opið. Stjørnan vann á Tjaldri í hálvfinaluni, og hetta kappingarárið hava tey bæði liðini verið í serflokki. Ein støða, sum eisini fær Unu at viðurkenna, at tær helst mugu átaka sær leiklutin sum stórfavorittar.

– Eg haldi, at vit mugu viðurkenna, at vit eru stórfavorittar. Nú skal eg ikki ljóða hástór upp á nakran máta. Men er dagsformurin hjá okkum ikki í lagi, soleiðis at finalan gerst heilt spennandi, so er tað ikki nóg gott av okkum. Tí við allari virðing fyri VÍF, so eiga vit at vera somikið sterkar, royndar og kaldar, at vit vita, hvat skal til fyri at vinna finaluna.

– Men samstundis ger júst tann veruleikin tað enn meira týdningarmikið hjá okkum at taka uppgávuna í álvara. Vit mugu ikki halda, at vit bara kunnu spadsera okkum til sigurin, tí VÍF hevur avgjørt ikki nakað vánaligt lið. Og tað er sæð somikið ofta, at kemur tú skeivt inn til ein dyst, er tað ótrúliga tungt at venda tí. So vit mugu vera klárar í høvdinum frá fyrsta bríksli, sigur Una Olsen.



Una Olsen ivast ikki í, at taka hon og liðfelagarnir uppgávuna í tí álvara, sum hon hevur uppiborið, so endar Coca Cola-steypið fyri sættu ferð í Klaksvík

Um hópin hjá Stjørnuni sigur hon, at Durita Christophersen, sum jú sjálv er úr Vestmanna, ikki er tøk, eftir at hon breyt sær fingurin.

– Men vit eru væl mannað, og tað skal ikki vera nøkur umbering, um vit ikki præstera tað, sum vit eiga. Vit hava allar glett okkum til finaluna, og nú skulu vit bara syrgja fyri at vera til reiðar at fara á vøllin og spæla hana, sigur Una Olsen.

## FAKTA

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1987 | Neistin I-Neistin II | 13-12 |
| 1988 | Neistin I-Neistin II | 16-13 |
| 1989 | Neistin-Søljan | 29-07 |
| 1990 | Neistin-Kyndil | 25-12 |
| 1991 | Skála-VB | 12-11 |
| 1992 | Neistin-Kyndil | 16-09 |
| 1993 | VB-Stjørnan | 21-13 |
| 1994 | Neistin-Stjørnan | 15-14 |
| 1995 | Neistin-Stjørnan | 23-14 |
| 1996 | Neistin-Kyndil | 18-10 |
| 1997 | Neistin-Kyndil | 23-18 |
| 1998 | Neistin-Kyndil | 21-18 |
| 1999 | VÍF-StÍF | 21-20 |
| 2000 | Kyndil-VB | 22-21 |
| 2001 | VÍF-VB | 31-18 |
| 2002 | VÍF-Stjørnan | 22-18 |
| 2003 | VB-VÍF | 19-18 |
| 2004 | Stjørnan-VB | 20-19 |
| 2005 | Stjørnan-Neistin | 23-18 |
| 2006 | Neistin-Stjørnan | 18-14 |
| 2007 | Stjørnan-VB | 31-28 |
| 2008 | Stjørnan-Kyndil | 29-22 |
| 2009 | Stjørnan-Tjaldur | 25-23 |

**Vinnarar 1987-2006**

| | |
|---|---|
| Neistin | 11 |
| Stjørnan | 5 |
| VÍF | 3 |
| VB | 2 |
| Skála | 1 |
| Kyndil | 1 |